# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ
*Administration of Occupational Safety and Health*
Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands
Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo


*Skrásetingar nr.:*

**L-A005-1**

# Leiðbeining
# um
# arbeiðsklæðir og persónliga verndarútgerð

Landsstýrið lýsti 04. september 1995 "Arbejdstilsynets bekendtgørelse nr. 746 af 28 august 1995 om brug af personlige værnemidler" og Arbejdsministeriets bekendtgørelse nr. 651 af 23. juli 1992 om sikkerhedskrav m.v. til personlige værnemidler" at verða galdandi fyri Føroyar.

Kunngerðirnar eru nýggjastu donsku kunngerðirnar á hesum øki og umfata ávikavist nýtslu av persónligari verndarútgerð hjá arbeiðsfólki í teirra arbeiði og trygdarkrøvini til hesa útgerð.

Við persónliga verndarútgerð skal skiljast øll útgerð, herundir arbeiðsklæðir, ið eru ætlað at verja arbeiðsfólkið móti einum ella fleiri vandum, sum kunnu hótta trygdina ella heilsuna hjá viðkomandi undir arbeiðinum, herundir eisini trygdarfótbúni, og somuleiðis alt, ið hoyrir til, fyri at tæna hesum endamáli. Øll verndarútgerð skal verða merkt og lúka trygdarkrøvini, ið ásett eru í kunngerðini um trygdarkrøv v.m. til persónliga verndarútgerð.

Við vanlig arbeiðsklæðir skal skiljast arbeiðsklæðir, ið ikki beinleiðis eru roknaði at verja tann einstaka móti heilsuvanda.

Er arbeiðið so dálkandi, at vandi er fyri, at skaðilig evni ein arbeiðir við, eitt nú olja, kann treingja í gjøgnum vanligu arbeiðsklæðini, og koma at húðini, so koma reglurnar um serlig arbeiðsklæðir í gildi.

Fylgjandi snýr seg í stuttum um serlig arbeiðklæðir og persónliga verndarútgerð og ásetur hvørjar skyldur, ið liggja á arbeiðsgevaranum, arbeiðsleiðaranum (formanninum) og arbeiðaranum.

### *Skyldur arbeiðsgevarans.*

**1.** Um arbeiðið ikki á annan hátt kann tilrættaleggjast og útinnast trygt og heilsuliga fult forsvarligt, so skal arbeiðsgevarin fáa tilvega og lata brúkaranum góðkend serlig arbeiðsklæðir og verndarútgerð, ið eru neyðug og egnaði til viðkomandi arbeiði, soleiðis at hetta kann útinnast trygt og heilsuliga fult forsvarligt.
Hann ber eisini allar útreiðslur til keyp, viðlíkahald og reingerð av hesi verndarútgerð og hevur ognarrættin til hesa. Arbeiðsgevarin skal syrgja fyri at dálkað verndarútgerð verður reinsað, turkað og sóttreinsað.

***Lógarheimild:***

Kunngerðirnar nr. K-A005-1 og nr. K-A005-2 frá 4. september 1995.

| *Útgivið fyrstu ferð:* | *Seinastu broytingar:* |
|---|---|
| **14. september 1995** | **15. november 1995** |

*Í nýggju kunngerðini er tann regla galdandi, at viðkomandi arbeiðsgevarapartur og fakfelag kunna*

*í serligum føri gera skriftliga avtalu um at deila útreiðslurnar til keyp, viðlíkahald og reingerð av arbeiðsklæðum og trygdarfótbúna. Hetta er tó ikki galdandi fyri arbeiðsklæðir og trygdarfótbúna, sum koma undir § 9 í kunngerðini um trygdarkrøv v.m. til persónliga verndarútgerð. Har arbeiðsklæðir, vegna slag av arbeiði, verða soleiðis dálkað, at tað ikki kann metast trygdarliga og heilsuliga forsvarligt, at viðkomandi arbeiðsfólk sjálvi reingera klæðini, kunna slíkar avtalur ikki gerast.*

**2.** Arbeiðsgevarin skal við skeltum avmerkja tey økir har ávís trygdarútgerð skal brúkast, og skulu skeltini eisini lýsa, hvat slag av trygdarútgerð talan er um.

*Skeltini skulu verða av góðkendum slagi og skulu týðuliga vísa, hvat slag av verndarútgerð skal nýtast á tí ávísa økinum. Tað er skylda hjá arbeiðsgevaranum at ansa eftir, at øll, ið uppihalda seg innan fyri avmerkingina, brúka tað ásettu verndarútgerð alla tíðina tey eru á økinum.*

**3.** Arbeiðsgevarin skal syrgja fyri, at neyðug verndarútgerð verður brúkt so leingi tað ávísa arbeiði varar. Arbeiðsgevarin skal eisini syrgja fyri, at brúkarin fær neyðuga leiðbeining í nýtslu av verndarútgerðini og upplýsing um vandan við ikki at brúka útgerðina.

*Tá talan er um at gera vart við vandan við ikki at nýta tað ásettu verndarútgerð kunna ymisk dømi nevnast. Í nógvum óljóði t.d. kann ein oyðileggja hoyrnina um hoyrnarverndin ikki verður brúkt alla tíðina, ein er í óljóðinum. Bert fáir minuttir uttan vernd er nóg mikið.*

**4.** Har brúk av verndarútgerð ger tað neyðugt við umklæðing, skal arbeiðsgevarin syrgja fyri hóskandi møguleika fyri hesum og fyri goymslu av skiftiklæðum.

*Á føstum arbeiðsstøðum eru hesi viðurskiftir sum oftast í lagi, men møguleiki fyri umklæðing og goymslu av skiftiklæðum skal eisini verða til staðar á skiftandi arbeiðsstøðum, har brúk av verndarútgerð ger hetta neyðugt.*

***Skyldur arbeiðsleiðarans.***

**1.** Arbeiðsleiðarin (formaðurin) skal ansa eftir og hjálpa til við, at neyðug verndarútgerð er tøk, og at hon verður brúkt trygdar- og heilsuliga fult forsvarligt.

*Á virkjum har 10 ella fleiri fólk starvast skal trygdarumboð veljast fyri hvørt formansøki og er tá arbeiðsleiðarin sum kunnugt annar parturin av trygdarbólkinum. Tað er tí natúrligt, at ein av hansara uppgávum er at ansa eftir, at serlig arbeiðsklæðir og verndarútgerð er tøk, har hetta er kravt, og at hesi klæðir og verndarútgerð verður nýtt trygdar- og heilsuliga fult forsvarligt sum ætlað.*

***Skyldur arbeiðstakarans.***

**1.** Arbeiðarin skal brúka tað útflýggjaðu verndarútgerð beinanvegin, tá arbeiðið byrjar og so leingi arbeiðið varar og skal eisini ansa eftir, at útgerðin virkar sum ætlað. Er feilur ella brek skal hann fráboða hetta til trygdarbólkin, arbeiðsleiðarin ella arbeiðsgevarin.

*Arbeiðarin hevur skyldu til at brúka ta neyðugu verndarútgerð. Noktar hann fyri hesum, má hann setast til annað arbeiði, ið ikki er meira áhugavert, og har verndarútgerð ikki er neyðug. Kann hetta ikki lata seg gera má viðkomandi sendast heim (sigast upp).*

***Skyldur útvegarans.***

**1.** Útvegarin (sølumaðurin) skal syrja fyri, at verndarútgerðin hann selur er soleiðis gjørd, at hon

trygdarliga verjir brúkarin sum ætlað uttan ampa. Útvegarin skal eisini syrgja fyri, at verndarútgerðin er roynd, góðkend og merkt eftir galdandi reglum.

Útvegarin skal saman við verndarútgerðini útflýggja leiðbeining á føroyskum máli (danskt, norskt ella svenskt kann góðtakast), ið greitt sigur, hvussu verndarútgerðin skal handfarast nýtast, viðlíka-haldast og goymast.

*Útvegarin skal ansa eftir, at tann verndarútgerð hann selur er góðkend og kann nýtast trygdar- og heilsuliga til tað ætlaða endamál. T.d. tá tað snýr seg um andadráttarverju, at kolsílan er av røttum slagi til at verja móti tí kemiska evni talan er um o.s.fr.*

***Arbeiðseftirlitið.***

Arbeiðseftirlitið kann í serligum føri áseta avmarkaða arbeiðstíð, hvílitíð og serlig vælfarstiltøk, tá hetta verður mett neyðugt, við atliti til ta likamligu og sálarligu last og ampa fyri arbeiðaran, ið brúkar slíka útgerð.

*Sum dømi kann nevnast, at tá tað snýr seg um andadráttarverju við kolsílu, so má ein slík bert nýtast í 3 tímar ein vanligan arbeiðsdag, fyri ikki at overva andingargøgnini.*

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ,** hin 15. november 1995.

Eli Davidsen, stjóri (sign.)